# Føroya Blindastovnur 15 ár

**Fríggjadagin 28. november** hevur Blindastovnurin valt at seta dagin av til vitjandi, sum hava áhuga at síggja húsið og vita meira um virksemið annars.

Fyrrapartin eru ymiskir samskiftisbólkar og fakbólkar innbodnir, sum á ymiskan hátt varða av fólki við sjóntrupulleikum.

**Seinnapartin er opið hús fyri almenninginum.**

**Skrá:**
**Kl. 10.00**
Húsið letur upp.

**Kl. 10.00-12.00**
Framsýning av húsinum.
Framsýning av hjálpartólum til blind og sjónveik.
Útgivnar ljóðbøkur.
Fyritøka úr DK sýnir fram lesitól og lesigløs.
Hjá optikara er møguligt at fáa eyguni kannað.

**Kl. 11.00**
Filmurin »Når synet bliver et problem« vístur fyri áhugaðum.

**Kl. 12.00 - 13.00**
STEÐGUR

**Kl. 13.00 - 16.00**
Sama skrá sum fyrrapartin.

**Kl. 15.00**
Filmurin »Når synet bliver et problem« vístur fyri áhugaðum.

Allan dagin fæst kaffi/te við smákøkum.

Øll áhugað eru vælkomin.

**Nevndin**

Føroya Blindastovnur

# Stjóri til P/F Fjarhitafelagið

Í sambandi við at stjórin í P/F Fjarhitafelagnum leggur frá sær vegna aldur, verður við hesum lýst eftir nýggjum stjóra.

Hetta er áhugavert starv við nógvum spennandi avbjóðingum og uppgávum fyri framman.

Stjórin í P/F Fjarhitafelagnum hevur um hendi dagligu leiðsluni av felagnum og skal saman við starvsfólkunum skipa fyri nýgerð og rakstri umframt dagligu fyrisitingini. Somuleiðis skal stjórin taka lut á nevndarfundum sum skrivari og annars samstarva við formann felagsins.

**Førleikakrøv**
Tann, ið søkir starvið sum stjóri í P/F Fjarhitafelagnum, skal hava
- útbúgving sum verkfrøðingur ella aðra líknandi útbúgving
- leiðsluroyndir
- góð samstarvsevni

Fyrimunur er, um umsøkjari áður hevur arbeitt við fjarhita og fjarhitaskipanum.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og/ella avtalu partanna millum.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við CV, arbeiðsváttanum, prógvum og møguligum viðmælum skal verða P/F Fjarhitafelagnum í hendi í seinasta lagi 15. desember 2003.

Starvið er ætlað til setan: 1. mars 2004

Umsóknir skulu stílast til :
**P/F Fjarhitafelagið**
Att. Beate L. Samuelsen, formaður
Postboks 3215
FO 110 Tórshavn
Viðmerkt: Stjórastarv

*P/F Fjarhitafelagið er felag, stovnað av Tórshavnar Kommunu og SEV í 1988. Endamál felagsins er at veita fjarhita í Tórshavnar Kommunu og at gagnnýta avlopshitan frá Kommunalu Brennistøðini á Hjalla og elverkinum á Sundi. Í løtuni hevur Fjarhitafelagið 450 brúkarar. Í felagnum starvast 5 fólk. Nettosølan er 3,6 mió. kr. árliga.*

**P/F Fjarhitafelagið**
Tinghúsvegur 15
Postboks 3215
110 Tórshavn

**DVEYLAN**
**Gólv- og vegg vask**



- **Vinyl**
- **Linolium**
- **Flísar**
- **Teppir**
- **Veggir**

**J.C. Svabosgøta 50**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 31 41 75**

# Róðrargrunnur Føroya

Grunnurin letur stuðul til róðrarfeløg í Føroyum av rentunum av innistandandi peningi.

Umsóknin skal sendast til:

Bergtóru Justinesen
Í Svanga 27
100 Tórshavn

áðrenn 15. desember.

**Nevndin**

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!






**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Termodrakt

- Draktin til byggimeistarar, entreprenørar og sjómenn
- Luksus termodrakt.
- Bláar og svartar við endurskini



TILBOÐSPRÍSUR
**598,-**

Sosialurin 341800




# Frá Meginfelag Útróðrarmanna

Aðalfundur felagsins verður hildin **sunnudagin 30. november kl. 13.00 á Hotel Hafnia.**

Skráin verður sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

Sosialurin



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

# Ergoterapeutur

Eitt starv sum ergoterapeutur á 0.8 tíð er leyst at søkja til setan hálvan januar 2004.

Stórur møguleiki er hjá viðkomandi sjálvur at mynda starvið sambært tann tørv, ið búfólkini hava sum t.d. fyribyrgjandi venjingar eins og hugnalig samvera.

Í løtuni koyrir eitt royndartiltak til dagstovnabrúkarar, sum vit vóna verður eitt verandi tiltak. Hesir brúkarar hava eisini tørv fyri ergoterapeutiskari tænastu.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, at kunna arbeiða sjálvstøðugt og opinleika fyri møguligum nýggjum avbjóðingum og broytingum.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at stíla til stýrið og senda til heimið áðrenn 21. desember 03. Meira fæst at vita við at ringja til leiðaran tlf. 332600.

Setanartreytir sambært sáttmála ergoterapeutanna við Fíggjarmálaráðið.

# Starvslýsing

Leitar tú eftir eini sera spennandi uppgávu – hevur tú handilsprógv ella erfaring??? So ert tú kanska nýggi dagligi leiðarin fyri Spf Skótabúðin í Havn.

Vit vilja her søkja eftir einum fólki til at reka alt tað dagliga í handlinum.

**Arbeiðið fevnir um**
- Sølu og tænastu
- Keyp av vøru o.l.
- Reingerð o.l.
- Dagligt bókhald
- Annars fyrifallandi uppgávur

**Vit ynskja at tú**
- Hevur handilsprógv (ella min. 5 ára kunnleika í handilslívinum)
- Ert samarbeiðsvilligur
- Hevur áhuga fyri sølu og tænastu
- Ert í góðum lag og fyrikomandi

Skrivlig umsókn skal sendast til
**Spf Skótabúðin**
**Boks 1080**
**FO 110 Tórshavn**

Síðsta freist at senda umsókn er týsdagin 9. desember 2003.

Hava tit spurningar, kunnu tit ringja til Hans Anfinnson Norðfoss á tlf. 224454.

# Nissan Sunny 2.0

diesel, st. car frá 1991 til sølu. Hevur nógvar nýggjar deilir, og eykasett av dekkum á felgum. Koyrir væl og startar altíð. Ongan rust.

**Niels, tlf. 243348**

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Tekniski skúlin í Tórshavn

Søkt verður eftir verkstaðarassistenti til Maskindeild skúlans.

Umsøkjarar skulu hava sveinabræv sum maskinsmiður, smiður ella líknandi, við minst 5 ára starvsroynd. EDV kunnleiki á brúkarastøði er ein fyrimunur, eins og víðari útbúgving er ein fyrimunur.

**Arbeiði umfatar:**
- Umvæling av amboðum og útbúnaði á deildini
- Innkeyp av tilfari á maskindeildini
- Umsita amboð og tilfarsgoymsluna á maskindeildini
- Verða lærarum til hjálpar í samb. við undirvísing á maskinverkstaðnum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Handverkarafelag.

Skrivlig umsókn merkt "verkstaðarassistentur" skal vera skúlanum í hendi seinasta lagi mánadagin 8. desember 2003.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Helga Mortensen, leiðandi lærara á maskindeildini á tlf. 515872

Starvið verður sett 1. januar ella skjótast tilber.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
**Marknagilsvegur 75, P.o.b. 239**
**FO-110 Tórshavn**
**Teldupostur: tst@tst.fo**

## Glastrevja útróðrarbátur til sølu



Um hóskandi boð fæst, verður m/b Scorpion seldur, við ella uttan fiskiloyvi

Bygdur í Onglandi í 2000. 30 fót langur, 250 HK motor frá 1998. Klárur til útróður

Línureiðskapur, 40 góðar svølalínur, gogguknúsari, uml. 80 goggurúsur.

Eisini verður ein 6 ára gamal lastbilur seldur.

Verða seldir saman, ella hvør í sær.
Selist vegna sjúku

Minni bátur kann møguliga takast í býti

**Áhugaði kunnu ringja á tel 210988 ella 423555**